


**_Nr. 1_** **_3. januar 2016_** **_76. árg._**

# Set álit títt á Guds umsorgan

*Men søkið fyrst Guds ríki og rættvísi hansara, so skal alt hetta verða givið tykkum umframt.* *Matt. 6,33.*

Í mongum føri er lív okkara soleiðis háttað, at tingini mugu gerast í ávísari raðfylgju. Tá ið vit gremja okkum um, at tað eru ting, sum vit áttu at gjørt, men sum vit ikki fingu stundir til, er tað dømi um, at vit ikki rættiliga hava skil á raðfylgjuni. Staðin fyri at taka okkum stundir til tað, sum er umráðandi her í lívinum, endar tað mangan við, at ein røð av týdningarleysum tingum taka tíð okkara. Ein onnur orsøk er, at vit hava lyndi til at lata tað liggja, sum krevur nakað av okkum, og sum fer í dýpdina. Soleiðis kemur tilveran lættliga mest at snúgva seg um týdningarleys ting.

Slíkum kunnu viðurskifti okkara lættliga enda við. Mong taka sær aldri stundir at fáa skil á hesum, hóast tey innast inni merkja, at tað áttu tey at gjørt. Bíblian verður aldri gloppað, og tey hava aldri stundir at fara í kirkju ella á møti. Eisini vit, sum játta okkum sum kristin, standa yvir fyri sama trupulleikanum. Dagligu uppgávurnar fara við tíð og kreftum okkara, so tað bara verður ein lítil løta til tað týdningarmesta. Tú verður fyltur av stúranum og strongd, og kenslan av tómleika krevur meira og meira rúm.

Henda trupulleikan tók Jesus fram í einari av prædikum sínum. Orðini her omanfyri eru júst úr henni. Hann sigur, at vit tilætlað mugu velja, hvussu vit priotera. Mangan skipar Jesus tingini í øvugtari raðfylgju í mun til, hvussu vit liva. Vit eiga at seta álit okkara á Guds umsorgan.

Jesus sigur ikki, at vit skulu liva sum fuglarnir og blómurnar og onki gera fyri at skaffa okkum tað, sum okkum tørvar til

lívsins uppihald. Hann biður okkum hyggja at teimum fyri at læra av teimum. Tað, sum hann vil, at vit skulu læra, er at hugsa um okkara andaliga lív og taka okkum stundir til tað, søkja HANN í orðinum og gerast upptikin av tí, sum er rætt í eygum hansara. So lovar hann okkum, at lív okkara fyllist við tí, sum okkum tørvar, og tí, sum ger lívið vert at liva.

Hugsa um hetta, nú vit hava stigið inn um gáttina til eitt nýtt ár.

*Mín Gud, sum valdar ævum øllum*
*og av ger mansins dagatal,*
*tú varði væl mín fót frá føllum*
*ta stuttu stund, eg liva skal.*
*Og kallar tú meg heim til tín,*
*so leið meg, kæri faðir mín!*

# Einglar barnanna

*Síggið til, at tit ikki vanvirða eitt einasta av hesum smáu; tí at eg sigi tykkum, at einglar teirra í himlunum altíð skoða ásjón faðirs míns, sum er í himlunum.*

*Matt. 18,10.*

Hvussu høgt barnið verður mett í Guds ríki, ásanna vit, tá ið vit lesa Jesu orð: “Tí at eg sigi tykkum, at einglar teirra í himlunum altíð skoða ásjón faðirs míns, sum er í himlunum.”

Hvørt barn hevur sín eingil. Gud ansar eftir og verjir hvørt barn her á jørð. Hann letur síni ósjónligu sendiboð ansa eftir teimum og verjir tey. Og alt, sum hendir børnunum, verður lagt fyri Guds ásjón í himlunum. Onki verður fjalt, alt verður lagt fram.

Sum tað er vælsignað at hugsa sær, at Gud sjálvur verjir síni smáu – hann letur einglar sínar verja tey.

Lær børnini umframt faðirvár at biðja hesa kvøldarbønina “Nú leggi eg meg at sova, Gud faðir í himli ver hjá mær og verj meg. Verj meg frá synd og sorg og vanda – lat eingil mín sita á songarstokkinum hjá mær, so eg trygt kann sova. Tøkk fyri, at tú hevur vart meg í dag.”

*t.* týddi.

---

“Tann, sum ikki trýr, skal glatast,” stendur í Bíbliuni. Fólk mugu fáa eyguni upp fyri tí, áðrenn tað er ov seint, tí vit eru her upp á lænta tíð, og menniskju kunnu óvæntað verða rivin burtur.

*e.c.* ums.

# Eitt skriftstað

Tað var ein samrøða á Visjon Norge við ein fiskimann frá Flekkerøya. Hann sang við í "Flekkerøy-guttene". Hann greiddi frá, at hann fór til skips sum 14-15 ára gamal, og síðani hevði hann verið á skipsdekki, og nú var hann nøkur og 60 ár.

Hetta var triðji báturin, sum familja hansara átti. Allir tríggir bátarnir høvdu havt sama navn. Tá ið pápi hansara hevði bygt fyrsta bátin, kom omman umborð við eini gávu. Hon hevði broderað eitt skriftstað og rammað tað inn. "Havið trúgv á Gud!" stóð seymað á hesi myndini. Tað er Jesus sjálvur, sum eggjar okkum til tað, og skriftstaðið stendur í Mark. 11,23.

"Kunnu tit ikki heingja hesa myndina upp í lugarinum?" spurdi omman. "Jú, saktans," svaraði sonur hennara, og so hongdi hann hana soleiðis, at tá ið tú steigst inn í lugarið, so var hon tað fyrsta, sum tú sást.

So gingu nógv ár, men ein dagin, tá ið hann – hesin ommusonurin - lá við kai í einum býi, kom hann í prát við ein annan fiskimann. Hesin spurdi hann: "Hvaðani ert tú?"

"Úr Flekkerøya."

"Álvara! Kennir tú nakað til ein bát, sum eitur so og so?"

"Jú, eg eigi hann sjálvur."

"Einaferð fyri mongum árum síðani," helt fremmandamaðurin fram, "fór eg umborð á tann bátin bara at vitja. Tað var soleiðis, at eg hevði gingið vaktur í eina tíð, men eg vildi ikki yvirgeva meg til Guds. Men tá ið eg stígi inn í lugarið, er tað fyrsta, sum eg síggi, eitt skriftstað. Har á vegginum stóð: "Havið trúgv á Gud!" Tá eg sá tað, virkaði tað so sterkt á meg, at eg gav meg yvir til Harran og bleiv herliga frelstur."

Ja, lítið grunaði omman, at so stór signing skuldi fylgja við hesi gávu. Men eg ivist onga løtu í, at mong bønin er farin upp til Harrans, meðan hon sat og broderaði.

*Effie Campbell* umsetti.

---

Tað nyttar ikki at spyrja: "Hvar vart tú, Gud?" Summir spurningar eru okkum ov stórir. Vit mugu bara ásanna okkara vantandi evni at skilja alt. Tað eru eingi einføld svør. "Harrin loysir fyrst leinkjur, síðani gátur," sum Skovgaard-Petersen sigur.

*e.c.* ums.

# *Vísdómurin hjá Onnu Frank*

Jødiska gentan, Anna Frank, búði í Hálandi undir Seinna Heimsbardaga. Góð fólk krógvaðu hana, so týsku hermenninir ikki tóku hana. Kortini endaði hon í einari av týningarlegunum hjá Hitler og doyði bert fáar vikur, áðrenn kríggið endaði.

Í dagbók síni skrivar hon 23. februar 1944: "Besti heilivágur hjá teimum, sum eru bangin, einsamøll ella ólukkulig, er at fara út fyri dyr onkustaðni, har tú kanst vera í kvirru og vera einsamøll við himmalinum, náttúruni og Gudi, tí bara tá kennir tú, at alt er, sum tað eigur at vera."

Dávid yrkir um ein líknandi tryggleika í Sálmi 62: *"Bíða í kvirru, sál mín, Gudi, frelsa mín kemur frá honum! Bíða í kvirru, sál mín, Gudi, vón mín kemur frá honum!" (Sálmur 62, 2 og 6).*

## Ger íløgur í mannasálir

Vit hava etið av tí skeiva trænum, kunnleikans træi (1. Mós. 2,9). Lívið sprettur innanífrá. Vit mugu investera, gera okkara íløgur, í tað innara menniskja, tí tað er tað, sum framleiðir ævigt lív. Vit mugu hvønn dag fylla okkum innan við Guds orði. Higartil hava vit gjørt okkara íløgur í tað ytra menniskja, í smyrsl og klæði í rúgvutali. Í einum ørindi stendur tað soleiðis: "Du pynter og pryder din arme krop, som padder og orme skal æde op." Latið okkum eta av lívsins træi og gera okkara íløgur í mannasálir, tí tær skulu liva ævigt.

*Effie Campbell umsetti.*

*Sunnudagsblaðið*

*ynskir øllum Harrans signing í nýggja árinum!*

*Heilsan blaðstjórin*

**Sunnudagsblaðið** er nú eisini at finna á alnetinum á føroyskum, donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum.
Adressan er: **www.jesus4all.dk**

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74




***Nr. 2*** ***17. januar 2016*** ***76. árg.***

# *Góð samvitska*

*Av teirri grund leggi eg mær sjálvum eina við altíð at hava óskadda samvitsku fyri Gudi og monnum. Áps.24,16.*

Góð samvitska er ikki okkurt, sum vit kunnu geva okkum sjálvum. Summi fólk halda, at tey, tá ið tey liva eitt vakurt og rættskaffið lív, hava veitt sær sjálvum eina góða samvitsku. Ein hevur verið rættvísur, liva eitt trygt og gott heimalív í trúskapi, gjørt tað, ið lagt varð á ein, tikið sína ábyrgd fyri landi og fólki.

Heppin er tann, sum soleiðis kann siga, men tað er tó ikki á henda hátt, at vit fáa tað góðu samvitskuna, sum Nýggja Testamenti talar um. Tað er heldur ikki hin keypta, góða samvitskan, sum veruliga er góð. Tú stoytti vinmann tín ella vinkonu, men so sendi tú honum ella henni afturfyri eitt blómutyssi við kærligari heilsan – og soleiðis hevur tú keypt tær eina góða samvitsku.

Rætt er tað at royna at bøta aftur tað, sum tú gjørdi skeivt, og tað er kristiligt, men ikki tann vegurin, sum veitir tær eina góða samvitsku. Hin sjálvfingna og keypta og góða samvitskan verður bara hálvgóð, og hetta er næstan verri enn ein ring samvitska.

Nei, Nýggja Testamenti talar um eina góða samvitsku, sum hvørki er sjálvfingin ella keypt; men hana kanst tú fáa ókeypis við at trúgva á Jesus Krist, uttan at tú ert verdigur ella hevur tað uppiborið. Tað er hin góða samvitskan, sum løgd varð á teg, tá ið tú vart doypt(ur) og fekst fyrigeving syndanna. Hevur tú so eina góða samvitsku?

*Mær halda Harrans hendur,*
*hvat so skal møta mær,*
*hvørt víkur ella vendir,*
*er Harri mín mær nær.*

*t.* týddi.

# Tú ert skrivaður inn í Guds testamenti

*"... geva tykkum arvalut saman við øllum teimum, sum halgað eru."*
*Áps. 20,32.*

Linda Knox var í áttatiárunum, tá ið hon doyði í hungri í íbúð sínari í Chicago. Tað var skilligt, at hon var heilavill, og hon sá illa. Hon legði eftir seg, tað sum svarar til 1.000.000 krónur í óinnloystum kekkum. 1.500.000 krónur í listaverkum, meir enn 3.000.000 krónur í smúkkum og umleið 300.000 í forngripum. Til samans legði hon eftir seg eitt búgv, sum var meira vert enn 5 milliónir – og kortini doyði hon einsamøll í fátækradømi. Tað, sum verri var, var, at hon hevði skrivað eitt uppskot til eitt testamenti, har hon læt alt til vinir og familju, men hon hevði ongantíð gjørt tað løgfrøðiliga galdandi, og tí gjørdist tað heldur ongantíð galdandi. Slektin og vinirnir vistu einki um teirra arv.

Tá ið Kristus doyði og fór aftur til Himmals, læt hann eitt testamenti eftir seg. Og í tað testamentið ert tú skrivaður í. So kanst tú spyrja: "Hvar finni eg eitt kopi av tí?" Í orði Hansara! Tú ert Guds arvingur og Krists samarvingur. (Sí Róm. 8,17) Tá ið hesin sannleikin finnur veg til títt sinni, fer tín hugburður til bíbliulestur at kollveltast. So fert tú – staðin fyri at brúka høpisleysar tímar at hyggja í sjónvarpið ella at vera á internetinum – at grunda á Skriftina "dag og nátt"; og "... alt, ið tú gert, skal eydnast tær." (Jós. 1,8 og Sálm. 1,2-3).

So skilir tú betri, hví Dávid segði: "Gleðast eg vil um boðorð tíni, sum eg eri góður við ... Lógin av munni tínum er mær betri enn gull og silvur í túsundtali." Sálm. 119,47 og 72. Pætur skrivaði: "Alt tað, sum hoyrir til lívs og Guds ótta við kunnugleikanum um hann, sum kallaði okkum við síni egnu dýrd og kraft, og við teimum hevur givið okkum tey størstu og dýrastu lyfti, fyri at tit við teimum skulu verða felagar í guddómligari náttúru." 2. Pæt. 1,3-4.

Hvat meir kanst tú ynskja tær?

"... et Ord til Dagen"
*Effie Campbell* umsetti.

# Halt í seglið, pápi!

Ein gamal brandmaður í London varð einaferð biðin um at siga frá onkrari uppliving í síni longu tænastu í sløkkiliðinum. Hann segði frá nógvum, sum var skakandi, men serliga ein hending var hugtakandi.

Eina náttina var boðað frá eldi í einum timburhúsum uttast í býnum. Tá ið sløkkiliðið kom á staðið, stóðu húsini í ljósum loga. Øll vóru sloppin út uttan sjey ára gamli drongurin, John, sum hevði sovið uppi á kvistinum. Tey sóu hann standa har uppi og halda sær fast um vindeygakarmin, meðan tey viðhvørt mistu hann burtur í roykinum og eldslogunum. Ómøguligt var at seta ein stiga upp hagar, og tí spentu teir eitt brandsegl og bóðu drongin leypa niður í tað.

Foreldrini orkaðu ikki at standa har og hyggja at, so tey sleptu sær eitt sindur burturfrá. Men vónleysa neyðarrópið frá soninum dró pápan yvir aftur móti húsinum.

“Leyp, John!” rópti fólkið, “vit halda væl í seglið.” – “Eg tori ikki,” var vónleysa svarið frá John har uppi á kvistinum. Eisini pápin royndi at eggja honum til; men lopið var ov vágið.

Tá hoyrdu tey málið í John har uppi millum eldslogarnar: “Pápi!” – “Ja, John!” – “Halt tú eisini í seglið, so skal eg leypa.”

Við skelvandi hondum og tárum í eygunum tók pápin í seglið.

“Nú haldi eg í, John,” segði pápin. Tá slepti tann lítli takinum um brennandi vindeygakarmin, og nøkur sekund seinni lá hann glaður og bjargaður í føvninginum á pápanum, sum hoyrdi hjarta hansara sláa, meðan hann varð borin burtur í faðirsins sterku ørmum. Hvat var tað, sum gav honum dirvi at leypa? Vóru tað eldslogarnir? Ella seglið? Ellu sterku brandmenninir? Nei, tað var, at hann sá pápan halda í seglið.

Soleiðis eigur tú at síggja naglamerktu hendurnar halda í frelsandi seglið, sum tú skalt leypa niðurí. Og vága lopið!

Tað er bara eitt fet inn í Jesu armar!

Latið okkum taka hesar tankarnar við okkum inn í nýggja árið.

# Tú meg leiðir við tínum ráðum

Ein søga er um ein pápa, sum altíð hevði nógv um at vera, men sum tó altíð tók sær stundir at taka sær av lítla soni sínum. Ofta hevði hann sonin við langar túrar inn í skógin. Tey stuttu beinini stríddust fyri at klára at fylgja við; tí plagdi sonurin at halda um lítlafingur á pápanum. Men tá ið vegurin gjørdist langur, hugdi hann upp í blíðu eygu hansara og segði:" Nú mást tú taka um hond mína, pápi, tí eg klári ikki at halda fast í teg longur."

Tað er hasa myndina, eg síggi fyri mær, tá ið Asaf í sálminum skrivar, hvussu gott tað er at rokna við Guds umsorgan. Í nánd av okkara himmalska Pápa, tí æviga góða Faðirinum í himlinum, kunnu vit siga: *"Men eg eri jú altíð hjá tær, tú hevur tikið í mína høgru hond! Tú meg leiðir við tínum ráðum og tekur meg síðan til dýrdar! (Sálm.73,23-24)*

*Eg vil fylgja tær, Jesus, í gleði, til eg*
*skal teg síggja á ævinnar strond,*
*og tá enn einaferð*
*eg skal rætta tær hond,*
*fyri trúskap í lívi og deyð.*

# Hvørjum roynir tú at tekkjast?

"Lat orð muns míns og hugsanir hjarta míns líka Tær, Harri..." Sálm. 19,15 (V.D.) Ræðist tú fyri, at onnur skulu halda lítið um teg, um tú tekur til orðanna og sigur tína hugsan? Bíblian sigur: "At ræðast menniskju leiðir í snerru..." Orðt. 29,25 (V.D.) Og ótti er vanligur hjá fólki, sum fegin vilja tekkjast øðrum. – Tað einasta, vit skulu hugsa gjølla um, er at tryggja okkum, at orð og tankar okkara líka Harranum. Í síðsta enda er tað bara hansara góðkenning, sum telur.

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er nú eisini at finna á alnetinum á føroyskum, donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum.
Adressan er: **www.jesus4all.dk/**

---

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74